# Umráðandi at verða sjónligur

**Nú veturin stendur fyri durum og tað verður myrkt, er umráðandi at hugsa um at gera seg so sjónligan, sum gjørligt. Tí verður aftur farið undir tiltakið »Trygg á leiðini«**

FERÐSLUTRYGD

– Vit kunnu heilt einfalt gera okkum sjónlig við at syrgja fyri at nýta ljós vetrarklæði og sjálvandi at nýta endurskin, sigur Ferðslutrygd.

Tí verður aftur í ár skipað fyri tiltakinum »Trygg á leiðini«, har allir næmingar í 1. flokki fáa hvør sín endurskinsvest. Í tí sambandinum varð skipað fyri tíðindafundi, har næmingar í 1. flokki í Eysturskúlanum vóru við.

Tiltakið er samstarv millum Ráðið fyri Ferðslutrygd og Tryggingarfelagið Føroyar. Vónin er, at skúlar og foreldur stuðla tiltakinum og gera sítt til at børnini nýta vestarnar so nógv sum til ber, og ikki bara í sambandi við skúlan, men eisini seinnapartarnar, tá ið spælt verður úti ella tá ið farið verður til ítrótt og onnur frítíðarítriv.




Starvslýsing www.runavik.fo



## Maskinmeistari

til vatnverkið hjá
Runavíkar kommunu

FØROYAPRENT · TEL. 314 555

Eitt starv sum maskinmeistari á vatnverkinum er leyst at søkja til setan 1. november 2006.

**Um vatnverkið**
Vatnverkið røkir øll teknisk mál sum hava við kommunala vatnið at gera. Deildin virkar sum ein partur av Teknisku deild.

**Starvið**
Tú kemur, í tøttum samstarvi við vatnmeistaran, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum øki við ráðgeving, eftirliti og øðrum uppgávum sum deildin annars tekur sær av.

**Arbeiðsuppgávan umfatar m.a.**
- Viðlíkahald, ábøtur, nýgerð og skráseting av rørskipanum
- Umsiting av leiðingum
- Umsiting av reinsiverkum
- Vaktarhald
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Vit leita eftir starvsfelaga ið**
- hevur útbúgving sum maskinmeistari, el. líkn., helst við hollum royndum sum handverkari
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hollan kunnleika til teldutøkni t.d. teldukoyrokoirt
- hevur góð samskiftisevnir, bæði muntliga og skrivliga
- er opin og hevur lætt við at umgangast starvsfelagar og borgararnar í kommununi

**Vit bjóða tær**
- Eitt spennandi starv við nógvum avbjóðingum
- Eitt gott og óformelt arbeiðsklima

**Setanarviðurskifti**
Starvið, sum er eitt fulltíðarstarv, verður sett skjótast gjørligt sambart sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

**Fleiri upplýsingar**
Fáast við at venda sær til Jógvan D. Jakobsen, býarverkfrøðing á telefon 417000

**Søk starvið**
Við at senda okkum eina umsøkn í seinasta lagi 12. oktober 2006.

*Umsøknin skal sendast til:*

Runavíkar kommunu
Tekniska deild
Postboks 139
Heiðavegur 26
Fo-600 Saltangará

**Runavíkar Kommuna**
*...ein kommuna í menning*


# Róin í nýggjum rokkbólki

**Í The Bait samstarvar Róin Siggertson við Sune Fey, ið Róin hitti undir upptøkunum av sjónvarpssendingini Rock Idols á TV3 í 2002**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Róin Siggertson hevur seinastu árini mest gjørt um seg sum einstaklingur undir navninum Rowan. Hetta navnið gjørdist fyrstu ferð kent í Føroyum og Danmark í 2002.

Rockidoler var ein sending á TV3 í 2002. Har gjørdist Róin fyrsta føroyska veruleikasjónvarpsstjørnan. Við síni rokk'n'roll attitútu og sterku útstráling, var Róin áskoðarafavorittur til at vinna sær plássið, sum sangari í fyrsta danska veruleikasjónvarpsrokkbólkinum. Men hann gjørdist ov stuttur.

Ein annar luttakari í kappingini var gittarleikarin Sune Fey, teir báðir fóru tá undir samstarv og skrivaðu tónleik saman í útvið eitt ár. Síðan tá hava báðir verið virknir í øðrum samanhangum, men um árskiftið hittust teir aftur, og stovnaðu rokkbólkin The Bait. Í eitt hálvt ár arbeiddu teir miðvíst við at skriva tónleik saman, og síðan høvdu teir upptøkuroyndir við trummuleikarum og bassleikarum. Her vóru tað Steven Ardilsø á bassi og Poul A. Knudsen á trummum, ið vóru mest sannførandi, og sostatt var The Bait ein veruligur rokkbólkur.

Tónleikurin er spennandi rokkur við íblástri frá nógvum ymiskum keldum, og tað kemst ikki uttanum, at tónleikurin tykist nærum fullkomin til røddina hjá Róini.

Bólkurin fer nú undir at spæla konsertir, tann fyrsta verður í Keypmannahavn í spælistaðnum Stengade 30, 31. okt., 3. nov. spælir bólkurin í Medborgerhuset í Brønshøj.

The Bait hevur fingið eina myspace síðu, og har ber til at hoyra løgini Here og Life Is Just a Second. Vitja bólkin á myspace.com/thebaitnet

# TUTL fløga vann DMA Klassisk heiðursløn

Tá DMA Klassisk heiðurslønirnar vórðu handaðar um vikuskiftið, var ein Tutl fløga millum tær heiðursløntu.

Tað er Danmarks Radio og felagskapurin IFPI, ið handar DMA Klassisk heiðurslønina, ið er í slekt við hinar DMA heiðurslønirnar, eitt nú DMA Folk, ið Eivør fekk í fjør. DMA Klassisk vendur sær til klassiskan tónleik.

"Lyt til Nyt" heiðurslønin varð handað bólkinum Moose Matrix, við m.ø. føroysku Onnu Klett, sum hevur gjørt fløguna "Night Pace". Tað er Tutl sum hevur givið fløguna út.

Í grundgevingunum sigur dómsnevndin, at fløgan prógvar at "vísur at nýggjur tónleikur kann hava veruliga slagkraft, eisini á fløgu. Fløgan er framleitt sum ein heild, og verkið fellur væl saman við tónlistarliga verkið. Tónleikarirnir geva tónleikinum tað rúmd, sum tónleikurin krevur fyri at spíla seg út", stendur m.a. at lesa á heimasíðuni hjá DR.

Kristian Blak sigur, at talan er um klassiskan tónleik sum er bygdur uppá elektronisk ljóð saman við akustiskum ljóðførum.

**RJJ**